# Húkaflotin og trolbátarnir missa annan hvønn fiskidag

**-og partrolararnir missa 20 prosent av sínum fiskidøgum. Harafturat verða fleiri leiðir friðaðar**

FISKIVINNA

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Tað kom neyvan óvart á nakran, tá landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum, Torbjørn Jacobsen, legði fram uppskot um at skarva 50 prosent av fiskidøgunum hjá húkaflotanum, tí tað hevði hann sagt frammanundan. Harumframt mælir hann til at skarva 20 prosent av fiskidøgunum hjá partrolarunum, og at fleiri leiðir verða friðaðar eftir tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni.

Í viðmerkingunum til uppskotið skrivar landsstýrismaðurin, at tað er ikki hugaligur lesnaður, sum hann hevur fingið frá teimum, sum sambært lógini um vinnuligan fiskiskap skulu ráðgeva landsstýrismanninum um, hvat skilabest er at gera, so gagnnýtslan av okkara týdningarmesta havtilfeingi fer fram á einum burðardyggum grundarlagi.

Landsstýrismaðurin vísir á, at tað hevur leingi verið almentkent, at serkunnleikin hevur mælt til munandi skerjingar í fiskidagatalinum, tí serliga toska- og hýsustovnunum tørva vernd at koma fyri seg aftur. Her er landsstýrismaðurin samdur við teimum, ið hava latið hesi tilmæli.

## Mugu fylgja vísindini

-Vit mugu gera alt tað, sum stendur í okkara makt at tryggja, at stovnarnir koma fyri seg aftur, so vit í komandi árum aftur trygt kunnu byggja okkara búskap á tað tilfeingi, sum er – og í framtíðini fer at verða – okkara grundvøllur, skrivar Torbjørn Jacobsen í sínum viðmerkingum. Tí kunnu vit ikki bara lata standa til, men mugu taka til eftirtektar ta vísindaligu ráðgevingina, sum er løgd fyri dagin. Hetta er høvuðsendamálið við hesum lógaruppskoti, skrivar Torbjørn Jacobsen.

Tí hevur hann mælt Løgtinginum til at broyta verandi fiskidagatal, soleiðis at fiskidagarnir hjá húkaflotanum og trolbátunum (høvuðsbólkar 3, 4 og 5) verða skerdir við 50%, og teir hjá partrolarunum(høvuðsbólkur 2) við 20%. Harumframt verða tilmælini frá vísind og vinnu, um at víðka friðingarnar á Føroya Banka, tikin til eftirtektar.

## Uppskotið

Sjálvt lógaruppskotið hjá landsstýrismanninum, sum Løgtingið nú skal viðgera, er soljóðandi:

§ 1
Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 29 frá 19. mai 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 9 a, stk. 1, litra a verður orðað soleiðis:
"a) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember, báðir dagar íroknaðir, á Føroya Banka innan fyri linjur, dregnar millum hesi 8 støð og í hesi raðfylgju:
1. 61°19'00"N 08°14'00"V
2. 60°58'00"N 07°43'00"V
3. 60°50'00"N 07°57'00"V
4. 60°24'00"N 09°07'00"V
5. 60°50'00"N 09°34'00"V
6. 60°54'00"N 09°34'00"V
7. 61°14'00"N 08°52'00"V
8. 61°19'00"N 08°14'00"V
Hetta veiðibann fevnir um veiðu við skovlváð, troli, snurriváð ella líknandi neti umframt allar aðrar veiðihættir, tó ikki beinleiðis veiðu eftir sild og makreli við kraftblokki."

2) Í § 9 a, stk. 1, litra e verður "Í tíðarskeiðinum frá 1. apríl til 31. januar, báðir dagar íroknaðir, 12 fjórðingar úr grundlinjunum og innan fyri linjur, dregnar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:" broytt til: "Alt árið 12 fjórðingar úr grundlinjunum og innan fyri linjur, dregnar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:"

3) Í § 27 verður "frá 1. september 2007 til 31. august 2008" broytt til: "frá 1. september 2008 til 31. august 2009."

4) § 29, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Innan fyri hvønn av høvuðsbólkunum av fiskiførum í § 28, stk. 1, sum eru í veiðiflotanum 1. januar 1995, verður fiskidagaskipan ásett fyri hesar undirbólkar við hesum fiskidagatali, sbr. tó stk. 3, sum verður býtt millum fiskiførini, tó so, at hædd verður tikin fyri møguligari umseting av fiskidøgum frá einum fiskifari til eitt annað í sama undirbólki, bólkur 5 tó undantikin.

Bólkur 2: Partrolarar 4.510 fiskidagar
Bólkur 3: Línuskip yvir 110 tons 1.701 fiskidagar
Bólkur 4 A: Útróðrarbátar millum 15 - 40 tons 842 fiskidagar
Bólkur 4 B: Útróðrarbátar størri enn 40 tons á línuveiðu 983 fiskidagar
Bólkur 4 T: Útróðrarbátar størri enn 40 tons á trolveiðu 840 fiskidagar
Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu 8.224 fiskidagar"
§ 2
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Tað er eftir avgerð Løgtingsins, at fiskidagarnir verða ásettir og harvið rásarúmið hjá størsta partinum av føroyska heimafiskiflotanum. Tann eini høvuðsbólkurin er undantikin fiskidøgum, men er reguleraður á annan hátt. Tað er skyldan hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, sum umsitur málsøkið, at leggja uppskot fyri Løgtingið, so avgerð tingsins kann verða tikin fyri 18. august. Hetta er høvuðsorsøkin til lógaruppskotið.

Tað er ikki hugaligur lesnaður, ið landsstýrismaðurin hevur fingið frá ráðgevandi stovni og nevnd, sum sambært lógini um vinnuligan fiskiskap skulu ráðgeva landsstýrismanninum um, hvat skilabest er at gera, so gagnnýtslan av okkara týdningarmesta havtilfeingi fer fram á einum burðardyggum grundarlagi.

Í rúma tíð hevur verið alment kent, at mælt verður til munandi skerjingar í fiskidagatalinum, tí serliga toska- og hýsustovnunum tørva vernd at koma fyri seg aftur. Landsstýrismaðurin er samdur við teimum, ið hava latið hesi tilmæli. Vit mugu gera alt tað, sum stendur í okkara makt at tryggja, at stovnarnir koma fyri seg aftur, so vit í komandi árum aftur trygt kunnu byggja okkara búskap á tað tilfeingi, sum er – og í framtíðini fer at verða – okkara grundvøllur.

Tí kunnu vit ikki bara lata standa til, men mugu taka til eftirtektar ta vísindaligu ráðgevingina, sum er løgd fyri dagin. Hetta er høvuðsendamálið við hesum lógaruppskoti. Landsstýrismaðurin hevur tí tikið avgerð um at skjóta upp fyri Løgtinginum, at fiskidagarnir hjá húkaflotanum og trolbátunum (høvuðsbólkar 3, 4 og 5) verða skerdir við 50%, og teir hjá partrolarunum(høvuðsbólkur 2) við 20%. Harumframt verða tilmælini frá vísind og vinnu, um at víðka friðingarnar á Føroya Banka, tikin til eftirtektar.



*Torbjørn Jacobsen mælir til umfatandi niðurskurð í fiskidagatalinum*

Mynd: Jens Kristian Vang

## Niðurskurður Fiskidagar 2008/09

Bólkur 2: Partrolarar 5.637 20% 4.510
Bólkur 3: Línuskip yvir 110 tons 3.402 50% 1.701
Bólkur 4 A: Útróðrarbátar millum 15 - 40 tons 1.683 50% 842
Bólkur 4 B: Útróðrarbátar størri enn 40 tons á línuveiðu 1.965 50% 983
Bólkur 4 T: Útróðrarbátar størri enn 40 tons á trolveiðu 1.679 50% 840
Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu 20.186 50%*) 8.224

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

Uppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri land ellakommunur. Hinvegin kann uppskotið – í stutttíðarhøpi - bera í sær ávísar búskaparligar ogsosialar avleiðingar fyri vinnuna og ávísar samfelagsbólkar, tí fiskidagatalið verður lækkað.